Sosialurin

# VARPIÐ

F R Í G G J A D A G U R 25. februar 2005



**Farin við vindinum** TCM
Oscar-dagurin nærkast av álvara, og hetta sæst aftur á fleiri rásum. TCM sendir í dag fýra filmar, ið hava fingið Oscar-virðisløn. Millum hesar er klassikarin Gone With The Wind, ið snýr seg um tað forkelaðu Scarlett, sum er uppvaksin á eini plantasju í Suðurstatunum í USA. Søgan fer fram undir amerikanska borgarakrígnum.
**Leygardagur 26. kl. 14.35**



**Loynan** svf
Við sendingini "Loynan" prikar sjónvarpið hol á eitt evni, sum ikki má umtalast, nevnliga kynsligan ágang móti børnum. Ongin veit hvussu umfatandi henda neyðin er í Føroyum, men kanningar í londunum rundan um okkum vísa, at umleið 10 % av øllum børnum onkursvegna hava verið fyri kynsligum ágangi.
**Sunnudag 27. kl. 21.00**

**Stjørna eitt kvøld** svf
Seinasta fríggjakvøld var seinna hálvfinalan, og nú eru allir finaluluttakararnir funnir. Hetta er endabresturin í seinasta umfari av Stjørna eitt kvøld nakrantið, og stjørnan yvir øllum hinum kvøldarstjørnum skal finnast.
**Fríggjadag 25. kl. 21.35**

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**